# Stýrisfundarbók FKF

## 08-03-2011 / 4

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 13:30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 22**

FKF Jour. nr: 09-136

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Tilbúgving, ábyrgdarbýtið millum land og kommunu

Málslýsing: At taka upp aftur frá stýrisfundi 8. februar.

Umboð frá Landsverk koma á fundin kl. 10:00, at umrøða tilbúgving í mun til oljudálking á sjógvi, ábyrgdarbýtið millum land og kommunu.

Fundarsamtykt: Landsverk ætlar at arbeiðið at skipa tilbúgvingina skal gerast liðugt í ár.
Samstarv millum partarnar m.a. viðv. felags skeiðum, venjingum, útgerð.
Landsverk fer at heita á partarnar at luttaka í arbeiðsbólki sum skal gera organisationsplan.

*Støða: Í bíðistøðu.*

**Fundarmál nr: 23**

FKF Jour. nr: 09-097

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Kommunala umskipanin, fíggjarleistur

Málslýsing: Í telduposti dagf. 25. februar, bjóðar Annika Olsen lsm. felagnum at viðmerkja "Uppskot til semju um fígging av eldrarøktini" í samband við, at økið skal leggjast til kommunurnar 1. januar 2013. Sí skjal 23.

Við grundarlagi í 9 kommunueindum, er skotið upp at fíggja útleggingina av eldrarøktini við afturbering og blokkstuðli, umframt ávísari serskipan fyri Sandoy, at seta í verk í seinasta lagi 1. januar 2013.

Skotið verður upp, at gjørd verður serskipan fyri Sandoy soleiðis, at landið við blokki letur ískoyti til Sandoy, soleiðis at inntøkurnar svara til, at íbúgvatalið hevði verið 2.000 við einum meðalskattaprosenti á 21,37 %.

Ein stórur partur av ójavnanum í skattainntøkunum, sum er millum tær 30 kommununum í dag, verður burtur, um hesar verða skipaðar í 9 økir.

Sett verður í verk ein afturberingarskipan, har landið heldur kommunurnar skaðaleysar av teimum frádráttum, sum eru í

skattaskipanini, t.e. botnfrádráttur, fiskimanna-, farmaskipa- og uttanlandsfrádráttur. Talan er um frádráttir, sum við 2009 tølum geva kommununum ein skattamiss á uml. 253 mió. kr.

Landsins partur av eldrarøktini er í dag uml. 340 mió. kr. Við at seta afturberingarskipan í verk, eru 87 mió. kr. eftir at fíggja fyri kostnaðin á eldrarøktini. Mælt verður til, at landið letur kommununum írestandi fíggingina sum blokkstuðul, sum verður roknaður samsvarandi býtinum av eldri borgarum í kommununum.

Fundarsamtykt: Viðmerkingar:
Spurningur settur til hvussu verður við investeringunum kommunurnar hava gjørt í eldra býlum.

Pensionistar á heimi skrásettir í heimstaðskommununi.

Niðurstøða:
Allar dýrkingar í samband við nýggja lóggávu skal landið bera.

Landið átekur sær allar frádráttirnar. Frádráttirnir fara at raka ymist. Útgreining av frádráttunum ógreið, hvørjar gruppur eru talan um. Dubultskattaskipan.

Blokkur.
Flyting av verandi  fígging via útjávning eftir pensionistatali til kommunurnar. Blokkurin má vaksa við vaksandi útreiðslum, og kann ikki einans taka støði í verandi útreiðslum.

Serskipan fyri Sandoy.
Spurningur blokkurin til Sansoynna er inkluderaður í blokkinum fyri alt landið.

Komandi lóggáva við nýggjum útreiðslum sum ikki er tikið hædd fyri. Bygging sum er ígongd, fellur eisini uttanfyri.

*Støða: Svarskriv 09-097_6 sent IMR 15. februar.*

**Fundarmál nr: 24**

FKF Jour. nr:

Reist av: Munin

Fundarmál: Umsókn um tilsøgn um kommunuluttøku

Málslýsing: Undir yvirskriftini "Nýggj landsdekkandi temakort fyri spillivatnsútleiðingar og vatnveitingarlendi til drekkivatn", hevur Munin søkt IMR um stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

Sí skjal 24, pkt 9, har ætlan er um kommunanna luttøku í verkætlanini. Sum Munin hevur upplýst, er ætlanin, at kommunurnar

lata arbeiðstímar til verkætlanina viðvíkjandi skráseting v.m.

Fundarsamtykt: Taka undir við verkætlanini. Vísa á, at felagið ikki kann áleggja kommununum luttøku.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 25**

FKF Jour. nr: 09-142

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Starvsfólk FKF

Málslýsing: Formaðurin mælir til, at lýst verður eftir nýggju starvsfólki at byrja 1. august, um ikki støðutakan fæst av samráðingum um eitt felag innan summarferiuna.

Fundarsamtykt: Samtykt.

*Støða: Í bíðistøðu.*